# gja á boðunum






*Stórur áhugi var fyri framløguni. Rættiliga nógvir eysturoyingar vóru til staðar*






> ”*Tveir tunnilsmunnar verða gjørdir á Skálafjørðinum, ein á Selvíndi á Strondum og ein við Løkin í Runavík. Hesir tunlarnir møtast so á Saltnesgrynnuni, hagani leiðin verður løgd víðari til eitt øki beint uttanfyri Sund á Streymoynni*

trimum árum síðani, var beinanvegin stórur áhugi fyri henni.

Í 2005 varð ein frágreiðing løgd fram um ætlanina, og nú er so umsóknin um loyvi at gera tunnilin handað landsstýrinum.

Ymiskar linjuføringar hava verið nevndar, og nevndin varð tískil noydd at taka atlit til tað stóra dýpið og bleyta tilfarið sum er í Tangafirði.

Tí varð einaferð hugsað um at gera ein heldur longri tunnil fyri líkasum at koma útum hetta dýpið. Men nú hevur ein so mett seg vera føran at fremja undirsjóvartunnilin, hóast hesar umstøðurnar.

Hetta hevur sum vera man kravt sína tíð og orku og hevur givið nógv høvuðbrýggj, men nú er klárt at fara í gongd við ætlanini við trimum tunnilsmunnum – á Sundi, Selvindi og við Løkin.

- Hetta verður ein stór tøknilig avbjóðing fyri okkum, men vit síggja okkum førar fyri at fremja hana í verki.

- Kann henda verkætlanin fremjast, so kunnu vit eisini bjóða okkum fram at gera aðrar, segði Dávur Reinert Hansen.

**Økta ferðsla**

Hóast nógv hevur verið tosað um hesa verkætlanina, kann eingin við vissu siga, hvussu nógv ferðsla verður gjøgnum ætlaða tunnilin.

Tað eru nógv atlit at taka í slíkum spurningi – bæði bústaðarmynstur, samfelagsgongd, arbeiðspláss og ikki minst, hvat tað fer at kosta at koyra gjøgnum ein slíkan tunnil.

Metingarnar hjá fyrireikarunum vísa, at ferðslan fer at økjast munandi, soleiðis at einir 4500 bilar fara at koyra gjøgnum høvuðstunnilin um dagin í 2014 – tað er: bert tvey ár aftaná at hann er tikin alment í nýtslu.

Mett verður eisini, at umleið 2100 akfør um dagin fara at koyra tvørtur um Skálafjørðin.

Hinvegin so vísa metingarnar, at í 2034 fer ferðslan at vaksa við umleið 50 prosentum.

## Bíligt at koyra

Tað fer sum nevnt at kosta eina slaka milliard at gera henda tunnilin. Men hinvegin er ætlanin ikki at tað skal gerast alt ov kostnaðarmikið at koyra gjøgnum henda tunnilin.

Fyrireikararnir hava havt ymisk roknistykki fyri framman, men tað er ikki óhugsandi at ein prísur uppá bert 20 kr. fyri at koyra gjøgnum tunnilin verður veruleiki.

Hetta ljóðar kanska lítið sannlíkt fyri mong, men við tað at ein roknar við nógv øktari ferðslu, trúgva teir uppá at ein kann halda fast við henda prísin.